gult22 cyan22 magenta22 svart22



B71-VB 1-3 (1-0)

# VB vendi dystinum

**Sandoyingar vóru á odda stóran part av dystinum móti VB, men tá 90 minuttir vóru leiktir, høvdu vágbingar kortini tryggjað sær stigini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Vágbingar vóru favorittar, tá teir sunnudagin fóru til Sands, har útidysturin móti B71 stóð á skránni. Ikki minst eftir ruddiliga sigurin á NSÍ fyri viku síðani, har tað mest sum var staðfest, at nú høvdu meistararnir aftur fingið ferð á spælið.

Hóast hetta, so mundu gestirnir ikki taka sær av løttum, tí júst B71 var eitt av bert tveimum liðum, sum í fjør megnaði at knógva vágbingum.

### B71 kundi økt

Eftir fyrstu trý korterini kundi eisini verið líkt til, at sandoyingar aftur í ár kundu gera okkurt við vágbingarnar. B71 var tá á odda, og hóast VB eisini royndi at trýsta, so hevði ikki eydnast teimum at javna leiðsluna, sum Kári Reynheim hevði givið heimaliðnum.

Leiðslumálið kom tíðliga í dystinum. Eitt innlegg slapp at ferðast aftur til handaru stong, har leikandi venjarin at kalla ótarnaður kundi stúta bóltin í netið.

Eftir hetta, so hevði heimaliðið eina løtu tamarhald á, tó at VB, sum nevnt, eisini royndi at trýsta. Vágbingar høvdu eisini møguleikar, men heimaliðið hevði gyltan møguleika at økja um leiðsluna, men úr sjey metrum eydnaðist ikki Julian Florescu at beina bóltin í kassan.

### VB trýsti heimaliðið

Fram móti endanum av fyrra hálvleiki lat heimaliðið seg trýsta longur aftur á vøllin, og hendan gongdin helt eisini fram í seinna hálvleiki.

Tíggju minuttir eftir at hol varð sett á seinna umfarið, eydnaðist eisini vágbingum at javna, og bert tríggjar minuttir seinni høvdu teir lagt seg á odda.

Fyrra málið kom, eftir at Birgir Jørgensen og Tórður Holm spældu bandaspæl, so Birgir at enda gjørdist leysur, og kundi senda bóltin í kassan. Seinnu ferðina var Predrag Zivkovic upp á spæl, tá hann fann ein leysan Jón Paula Olsen, og nú vóru tað brádliga vágbingar, sum stóðu við bestu kortunum.



*Tórður Holm byrjaði dystin á beinkinum, men kom á vøllin í seinna hálvleiki, og var við í uppspælinum til tvey av VB-málunum*

Tað eydnaðist ongan tíð veruliga hjá heimaliðnum at koma aftur í aftur dystin, og fram móti endanum kundi leikandi venjarin, Krzyztof Popczynski, staðfesta sigurin, eftir at Tórður Holm hevði havt næst seinasta fótin á.

### Skulu tora

Við sigrinum helt VB sostatt fast um tað, sum líkist einari ætlan um heiðursmerki, og ikki minst munnu teir báðir seinastu sigrarnir kennast fløvandi, eftir at liðið annars hevði tapt tríggjar dystir á rað. Orsøkirnar eru kanska fleiri, og millum annað hevur liðið nú ikki skaðar at dragast við, eins og leikbann ikki hava gjørt seg galdandi hesar báðar dystirnar.

Sum skiltist á vágbingunum, so mundi størsta orsøkin kanska vera tann, at liðið nú veruliga er farið at stríðast aftur. Í fleiri dystum í fjør var júst stríðsviljin avgerandi faktorurin, og tí frøast teir ivaleyst um, at hugburðurin til uppgávuna nú aftur tykist at vera hin rætti.

Fyri sandoyingar mundi tað hinvegin kennast hugstoytt, at teir aftur mistu eina leiðslu. Hetta hevur fleiri ferðir verið galdandi tey bæði seinastu árini, og ivaleyst er her talan um ein sálarligan trupulleika.

Innan ítróttarsálarfrøði verður ofta tosa um hugtakið »at tora at vinna« og ivaleyst er tað eisini hetta, sum sandoyingar skulu læra. Spurningurin er so bara, hvussu dýrur lærupeningurin verður við hesum, tí á næstniðasta sessinum eru ikki ráð ella stundir at bíða alt ov leingi eftir næsta sigrinum.

### B71-VB 1-3 (1-0)

1-0: Kári Reynheim 4
1-1: Birgir Jørgensen 55
1-2: Jón Pauli Olsen 58
1-3: Kristof Popczynski 88

Dómari: Lassin Isaksen (KÍ)

**B71:** Valdemar Nowicki – Jógvan Jón Petersen, Bernhard Petersen, Bergleif Sólsker – Hans Jørgen Djurhuus Eli Hentze, Jón Brekku, Julian Florescu, Bjørn Thorsteinsson – Kari Reynheim, Kári Nielsen

**VB:** Bjarni Johansen– Predrag Zivkovic, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen – Jóan Pauli Olsen, Marek Vierbicki, Michael í Lágabø, Krzyztof Popczynski, Palli Augustinussen – Birgir Jørgensen, Robert Cieslewicz

# Konubrotið úr Svøriki

**Sterk kapping verður í løtuni telvað í Svøriki, har kvinnuligi svenski stórmeistarin Pia Cramling óvæntað er á odda framanfyri menn sum Jan Timman, Ivan Sokolov og Curt Hansen. Eisini hevur Flóvin Tór Næs júst luttikið í einari IM-kapping**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Søguríka Sigemann Chess Tourament í Malmø er nærum liðug telvað, og í ár vísir tað seg at GM Pia Cramling hevur góðar møguleikar. Eftir seks umførum er hon saman við landsmanninum Tom Wedberg á odda við fýra stigum, meðan unga stjørnuskotið Teimour Radjabov og veteranurin Boris Gulko eru beint í hølunum.

Sokolov, Timman og danin Curt Hansen hava allir telvað undir miðal og liggja javnir við trimum stigum. Nevnast skal tó at Curt hevur vunnið síni tvey seinastu talv og tykist væl á veg. Trý umfør resta í.

Aðrir í hesari GM-kapping eru Johny Hector, Nick de Firmian og altjóða meistarin Emanuel Berg. Hesir liggja allir í niðara enda og stríðast.

### Pia omaná

Stuttligt hevði verið um svenska konubrotið Pia helt fram við góða spælinum og møguliga endar ovast tá avtornað er. Hon er við sínum 2496 ratingstigum seedað sum nummar níggju, eitt framanfyri Emanuel Berg, 2474, og er tað tí sera óvæntað um hon megnar at knógva mannfólkinum. Føroyavinurin Ivan Sokolov er hægstrrataður.

Fylgjast kann við kappingini á www.sigemanchess.com.

Flóvin Tór Næs luttók í IM-kapping í Stokholm, sum endaði sunnudagin. Flóvin hevði lægsta styrkistalið í tíggjumansbólkinum. Tann hægsti hevði beint omanfyri 2400 í rating í mun til altjóða ratingtalið 2236 hjá Flóvini. Hann fekk óhepna byrjan á kappingina, tapti trý tey fyrstu talvini og reistist ikki aftur. Flóvin endaði loksins aftastur við hálvumøðrum stigi. Marginalarnir vóru ikki á hansara síðu á hesum sinni.

### EM

Í Makedonia hevur altjóða talvsamgongan Fide skipað fyri sokallaðum EM. Heili 204 telvarar, harav nógvir sterkir stórmeistarar, í einum opnum bólki. Vinnari bleiv Emil Sutovsky úr Ísrael eftir umdyst við Ruslan Ponomariov. Judit Polgar gjørdist nummar trý, og tískil kann sigast við vissu at kvinnuligir telvarar hava í hesum løtum góðar dagar.

Norðurlendsku umboðini vóru ikki við í toppstríðnum. Danin Peter Heine Nielsen hevði eina ringa kapping meðan íslendarin Hannes Stefansson bleiv fremsti norðurlendingur.

Teir ovastu 46 telvarnir fingu beinleiðis atgongumerki til Fide-HM seinni í ár.

## Talvið hesa vikuna

**Cramling,P (2496) - Berg,E (2474) [A87]**
**Sigeman & Co Malmoe SWE (5), 16.06.2001**

(Eftir 24_Bxe6)
1.d4 f5 2.g3 Nf6 3.Bg2 g6 4.b3 (Yvirdekkar e5) Bg7 5.Bb2 0-0 6.Nf3 d6 7.0-0 Qe8 8.c4 Na6



9.Nbd2 Rb8 10.Qc2 b5 11.a3 c5 12.dxc5 Nxc5 13.cxb5 Qxb5 14.Nd4 Qe8 15.b4 Ne6 16.Qb3 Qf7 17.Nc6 (Tað hongur væl saman hjá hvítum. Nógvar hálvopnar linjur at arbeiða við) 17...Rb7 18.Rac1 Rc7 19.Rc2 Ne8 20.Bd5 Bxb2 21.Qxb2 Nf6 22.Bb3 Kg7 23.Rfc1 Qe8?? (stórt mistak. Støðan er tó kortini helst tapt hjá svørtum) 24.Bxe6 Bxe6
DIAGRAM
25.Nd4! (Og hvítur vinnur mann) 25...Rxc2 26.Nxe6+ Kf7 27.Ng5+ 1-0

gult23 cyan23 magenta23 svart23



Avloysari

## Lastbilførari á Drelnesi

Strandfaraskip Landsins lýsa við hesum eftir avloysara í 3-4 mánaðir, sum lastbilførari til farmastøðina á Drelnesi, Tvøroyri.

**Starvið fevnir um**
Høvuðsuppgávurnar hjá lastbilføraranum eru at vera við til:
- Farmaflutning og farmaavgreiðslu
- Fylgja uppgávum, málsetningum o.ø. fyri farmastøðina
- Tryggja gott samstarv við kundar, myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar
- Vegleiða og upplýsa kundar
- Frágreiðingarskyldu yvirfyri farmastøðleiðaranum

**Førleikakrøv**
- Koyrikort til lastbil/trailara
- Krana- og trukkprógv
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap og er kundavinarligur

**Setanartreytir**
Løn- og setanartreytir verða eftir sáttmálanum hjá Føroya Arbeiðarafelag.

**Umsóknir**
Umsókn við avriti av prógvum, ummælum, CV og tilvísingum skulu sendast til:

**Strandfaraskip Landsins**
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi skjótast til ber.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú venda tær til William Mortensen, Farmastøðsformann.

Tlf. 37 13 38 ella e-post: ssl-drel@ssl.fo

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 opera-tørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## RÆTTING FRÁ TÓRSHAVNAR KOMMUNU

**Rætting til lýsingina "Útbjóðing", sum var í bløðunum 14. juni 2001.**

Tann 31. mai 2001 samtykti býráðið at bjóða út arbeiðið at byggja tveir nýggjar dagstovnar, ið hvør skal vera til 36 barnagarðsbørn og 24 vøggustovubørn, at langtíðarleiga kommununi. Býráðið samtykti eisini, at tilboðini skulu latast kommununi 1. august 2001.

Av misgáum er komið at standa í lýsingini, at tilboðini skulu verða Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. juli 2001 kl. 15.00.

Hetta skal broytast, soleiðis at tilboðini skulu verða Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi mikudagin 1. august 2001 kl. 15.00.

SNARSKIVAN

GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR.
NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI

**Til útisetar í Danmark**
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Skjót levering

Sosialurin - 311820

Danstein
Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
www.danstein.fo Fax 449961
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

FARTELEFONIR
GSM - NMT 450
Tráðleysar telefonir o. a.
Ymisk merki, so sum:
MOTOROLA
ERICSSON
NOKIA
CONNECTING PEOPLE
SIEMENS
BENEFON
SØLA & TÆNASTA
Storno
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045

## Scania P93 til sølu



Árg. 1991. Við nýggjari lift. Hevur isoleraðan kassa (Norfig), og er í góðum standi. Til sølu fyri 95.000 kr. v/mvg

**Tlf. 314728 ella 219728**

Lesið Sosialin

Nýggjar
TANNPROTESUR
Broytingar og umvælingar av gomlum protesum
Kliniskur tannteknikari
BERGUR
Á REYNATRØÐ
Børkuvegur, 620 Runavík
Tlf. 448480
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

Norðurlandahúsið í Føroyum
Sí SVF tekstvarp s. 650

Uppsetan og skipan av barrum
Til:
Brúdleyp
Rundar føðingardagar
Starvsfólkaveitslur
Ársveitslur
Reseptiónir
og tilíkt
Hans á Lag Sp/f
Tlf. 21 93 83
hanslag@post.olivant.fo
Sosialurin 311820